## AB á ránsveiðu í HB

Heilir fýra leikarar úr HB hava í summar skift til grannarnar av Argjum. AB hevur í ár havt eitt vánaligt kappingarár og liggur á 9. plássi. Millum leikararnar, ið eru farnir úr AB eru Tórður Thomsen, sum hevur skift til HB og Stig-Roar Søbstad, sum skifti til B36. Eisini Alex Mellemgard, Jobin Drangastein og Tummas Justinussen gevast í AB til seinnu hálvu í kappingini, tí teir skulu niður á fótbóltsskúla. Fyri at fylla holini eftir teimum, hevur AB verið hjá granninum úr HB og leita sær styrk. Fyrst komu Thomas Juul Thomsen og Tróndur Sigurðsson. Nú boðar heimasíðan hjá AB frá, at AB eisini hevur gjørt sáttmála við Ingvard Vang og Yohan Andres Borðoy, sum báðir hava spælt við 1.deildarliðnum hjá HB í ár. AB skal týsdagin 27. juli spæla ímóti EB/Streymi á heimavølli. Tað er fyrstu ferð at nýggi grasslíkisvøllurin á Argjum verður tikin í nýtslu.



Mynd: Terji S. Johansen (www.ab.fo)

# Hafsteinn hevur munin

**SÚKKLING** Aftur í gjár vann Hafsteinn Ægir Geirsson, hóast hann bara var eitt sekund framman fyri riðilin aftanfyri. Men í dag stendur stóra styrkiroyndin, tá súkklararnir í Statoil Kring Føroyar skulu royna seg í Suðuroynni

Hilmar Jan Hansen

Sum væntast kundi, gjørdist tað ikki á Eysturoyarteininum í gjár, at tað fór at líkjast nakrari avgerð. Nokk so tíðliga fóru einir 12-13 súkklarar avstað frá hinum og hildu seg undan allan vegin, umframt at onkur datt burturav. Men tá teir komu á mál, vóru 10 við í fremsta bólkinum.

Fleiri ferðir ávegis royndu onkrir av og á at skræða seg leysar frá hinum, men tað vardi bara eina lítla løtu, so vóru teir tiknir aftur. Hóast okkurt kundi hent niðan ímóti Norðskálatunlinum, í Skipanesbrekkuni ella niðan ímóti Skriðunum, slapp eingin avgerandi avstað.

Í staðin gjørdist tað ein langur, taktiskur endaspurtur frá Lambareiði út til rundkoyringina í Runavík og líka inn á málið við Glyvra skúla. Framvegis vóru 10 við, og á hesum lutfalsliga lítla pettinum av samlaða teininum, sum var 115 kilometrar, hendi alt møguligt og fleiri skiftu fleiri ferðir um pláss.

Men tá súkklararnir komu inn ímóti málinum, hevði Hafsteinn Ægir Geirsson slitið seg so mikið leysan av hinum, at hann við tíðini tríggir tímar og 14 minuttir var eitt sekund frammanfyri, meðan allir hinir níggju fingu somu tíð. Gunnar Dahl-Olsen var næstfremstur, síðani kom Kristian Gosvig og síðani allur riðilin.




FYLGDUST

*Teir fremstu vóru saman í einum bólki í kappingini í gjár, tá tað gjørdist ein endaspurtur við tilsamans 10 súkklarum*

Mynd: Hilmar Jan Hansen

### 30 sekund á muni

Tað merkir fyri samlaðu støðuna, at Hafsteinn framvegis er á odda, men leiðsluna upp á fimm sekund, sum hann vann sær í prologinum í Klaksvík, fekk hann bara økt við einum sekundi upp í seks, tí Torkil Veyhe var millum allar súkklararnar, ið komu á mál beint aftan fyri íslendingin.

Í liðkappingini er liðið hjá Hafsteinn, HFR, 30 sekund framman fyri liðið hjá Torkili, Team PE Kolonial, og kappingin millum hesi bæði verður undirstrikað av, at belgiska Wheels Of Steel er næstan 22 minuttir aftan fyri hini bæði liðini!

Hjá kvinnunum, ið súkkla fulla teinin, var Súsanna Skylv fremst við tíðini 3:25,07, sum hevði givið eitt pláss beint niðan fyri miðjuna í kappingini hjá monnunum. Hjá teimum, ið súkkla ein heldur styttri tein, var Knud Glerup fremstur hjá unglingunum og hjá motionistunum var Peder Bay fremsti maður og Iben Dam fremsta kvinna.

Í dag verður súkklað í Suðuroynni, har byrjað verður á Tvøroyri, og síðani verður súkklað til Fámjins og síðani suðureftir eftir Hovsegg, til Sumbiar og aftur til Vágs, har súkklararnir koma á mál við Torgið. Væntandi kann eitt og annað avgerast í Suðuroynni, har fleiri drúgvar brekkur eru á teininum, og tað var her, kappingin varð avgjørd í fjør.

Í morgin verður 32 kilometra langur einkultstartur í Vágum, har súkklað verður úr Sandavági til Bíggjar, og sunnudagin endar kappingin við 109 kilometra langa Streymoyarteininum, ið byrjar í Tjørnuvík og gongur til Havnar umvegis Saksun, Oyggjarvegin og Gomlurætt, áðrenn súkklararnir koma á mál við Gamla Apotek.

## Siga sum minst

**SÚKKLING** Hvørki av fremstu liðunum vil siga nakað um taktikkin í Suðuroynni í dag

Hilmar Jan Hansen

– Eg sigi einki. Vit fáa at síggja í morgin.

Tað sigur Hafsteinn Ægir Geirsson, tá hann verður spurdur um íslendska taktikkin í Suðuroynni, har annar harði dagurin á rað er á skránni í Statoil Kring Føroyar.

– Tað sigur seg sjálvt, at eg og liðið fyrst og fremst skulu verja okkara støðu, so tað er líkasum upp til aðrar, um teir ætla at leypa á. Men har eru nógvar brekkur, so fáa vit at síggja, sigur Hafsteinn.

Heldur ikki Gunnar Dahl-Olsen, sum í gjár var næstfremstur á mál og er á næstfremsta liðnum, vil siga nakað um, hvussu ætlanin er at súkkla seg til sigurs í Suðuroynni í dag.

– Nú høvdu vit ein harðan endaspurt á Glyvrum, so alt kann henda í Suðuroynni. Men tað verður ein heilt onnur kapping, tí har eru fleiri støð, har tað ber til at stinga av, sigur Gunnar.

– Í fjør var tað niðan úr Fámjin, at alt bleiv avgjørt, men har eru fleiri møguleikar. Torkil, Gudmundur og eg fara í øllum førum at gera okkara til, at vit kunnu vinna liðkappingina aftur í ár.

hilmarjan@sosialurin.fo